Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Venjing til parkinsonsjúklingar

Spurningar:

1. Heldur landsstýrismaðurin, at verandi venjingartilboð til parkinsonsjúklingar er nøktandi?
2. Hevur landsstýrið nakra ætlan um at taka stig til - í samstarvi við kommunurnar og Almannaverkið - at lívlong málrættað venjing verður eitt tilboð fyri allar parkinsonsjúklingar í Føroyum?

Viðmerkingar:

20. august í ár hoyrdist í Kringvarpinum um vantandi málrættað tilboð um venjing til parkinsonsjúklingar. Hetta, hóast vit hava tvífalt so nógvar parkinsonsjúklingar sum í Danmark, sammett við fólkatalið.

Á heysti 2020 varð endurvenjing fyri sjúklingar við Parkinson á Suðuroyar sjúkrahúsi sett á stovn í samstarvi við Landssjúkrahúsið, har sjúklingar kunnu koma á rehabiliteringsuppihald tvær ferðir um árið.

Tørvurin hjá hesum sjúklingum er lívlong støðug venjing. Í Danmark er hetta tilboð ókeypis fyri borgaran og eitt tilboð, ið viðkomandi fær, tá sjúkan er staðfest, uttan mun til aldur. Sum skilst er tað bert av og á, at kommunurnar hava tíðaravmarkað tilboð um venjing til borgarar yvir 67 ár, og tað kann hugsast, at ein orsøk er, at ymiskt er, hvussu stórt talið á sjúklingum er og ymiskt, hvar borgarin er í sjúkugongdini í teimum ymsu kommununum. Venjingin er ofta ikki beinleiðis málrættað sjúklingum við Parkinson. Eisini bjóðar Almannaverkið tíðaravmarkaða venjing.

Í Føroyum er økið tvíbýtt. Landið hevur ábyrgdina av teimum, ið eru yngri enn 67 ár og kommunan ábyrgdina av teimum, ið eru eldri enn 67 ár. Tað kann hava við sær, at borgarar detta ímillum skipanir – møguliga tí tað er trupult at skipa málrættaða venjing í hvørjari kommunu sær. Tískil er spurningurin, um tað ikki hevði verið best og mest nøktandi fyri borgaran, um landið tók stig til eitt samskipað málrættað landsumfatandi tilboð til allar borgarar við Parkinson uttan mun til aldur.

Á Løgtingi, 31. august 2021

Eyðgunn Samuelsen